# ítróttur

Nr. 246 • hósdagur • 20. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# Grundin skal stoypast

**Landsliðsvenjarin í kvinnuhondbólti hevur tikið fyrsta hópin út, og á lepanum eru fleiri nøvn, sum ikki hava verið sett í samband við A-landsliðið áður**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Fyri stuttum kom tað endaliga í rættlag, at Jónleif Sólsker verður venjari hjá føroyska kvinnulandsliðnum í hondbólti, og nýggi venjarin hevur ikki ligið á løtu síðuni, síðani hendan avgerð varð tikin.

Hann hevur verið trúgvur gestur til fleiri landskappingardystir síðani hetta, og nú hevur hann so kallað inn til fyrstu venjingarnar.

Vit kunnu í hesum viðfangi leggja afturat, at tað enn ikki heilt greitt, hvør verður hjálparvenjarin hjá Jónleifi, meðan tað liggur fast, at Ann Rubeksen verður liðleiðari.



*Sólja Nielsen, sum her sæst í dysti fyri Sóljuna móti Kyndli, er ein av nýggju leikarunum í fyrsta bruttohópinum, sum Jónleif Sólsker hevur tikið út*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fleiri nýggj nøvn

Venjingarnar, sum byrja 29. desember, eru liður í langtíðarætlanini, sum hevur til endamál at hava eitt so sterkt landslið sum gjørligt, tá kvinnurnar á heysti 2003 skulu royna seg í EM-undankapping.

At arbeiðið er somikið langsiktað, merkir sjálvandi, at venjarin avgjørt hevur tikið atlit til framtíðar menning av leikarum, tá liðið er tikið út, og tískil eru nøkur meira ella minni óvæntað nøvn við í hópinum, sum nú er úttikin, ella er talan í øllum førum um nøvn, sum ikki vóru á lepanum, tá kvinnurnar fyri einum ári síðani spældu landsdyst ímóti Svøríki.

Sjálvur leggur Jónleif tó dent á, at talan í fyrstu atløgu er um ein bruttohóp.

– Nú eru hetta fyrstu venjingarnar, so í fyrsta umfarið havi eg innkallað tær, sum eg í løtuni haldi hava bestu møguleikarnir at gera seg galdandi. Tað er jú ógjørligt at siga, hvørjar leikarar eg havi tøkar á heysti 2003. Tað kann væl vera, at onkur nýggj hevur stungið seg fram tá, eins og tað heldur ikki er vissa fyri, at allar tær 23, sum nú eru úttiknar, eisini spæla hondbólt til ta tíð, sigur venjarin í stuttari viðmerking.

Tær 23, sum nú eru úttiknar til bruttohópin eru: Nicolina Eyðbjørnsdóttir, Fríða Marjunardóttir, Jórun Ludvig, Sóley Mikkelsen, Jacklin Durhuus og Hallfríð Isaksen úr VÍF. Helena Dam, Katrin á Neystabø, Gunnleyg Berg, Birita Wardum og Annika Thomsen úr Neistanum. Joan M. Joensen, Bára Skaale, Una Olsen og Anna Kristina Samson úr Stjørnuni. Annika Ljósstein, Fríða Petersen og Anja Johannesen úr Kyndli. Gurið Mortensen og Margreth Augustinussen úr VB. Hertha Simonsen og Sólja Jóanisdóttir úr Sóljuni og Beinta Joensen úr Tjaldri.

# NSÍ sett samskipara

**Fótbóltsfelagið í Runavík tykist veruliga at brynja seg til komandi tíðirnar, og umframt styrktan leikarahóp, verður umsitingin í felagnum nú eisini styrkt**

FÓTBÓLTUR

*Jákup*

Frá 1. desember í ár at rokna varð 32 ára gamli Áki Andreasen, sum annars er búsitandi í Fuglafirði, settur í starv sum samskipari hjá NSÍ.

Sum samskipari kemur Áki sjálvsagt fyrst og fremst at hava ábyrgd av, at allir aktivitetir í felagnum koyra eftir ætlan. Harumframt verður hann eisini eitt slag av marknaðarleiðara, soleiðis at hann í stóran mun kemur at taka sær av, hvussu andlitið hjá felagnum verður úteftir. Her verður serliga hugsað um sponsorrøk, fáa nýggjar lýsarar til vega o.s.fr.

Í tíðindaskrivi sigur NSÍ, at hetta er eitt av fleiri stigum á leiðini til eina framhaldandi menning av felagnum í bæði ungdóms- og vaksnamannahøpi, eins og tey vóna, at hetta eisini kann virka til at effektivisera summi øki í felagnum.

Harafturat innihalda nýggju UEFA-reglurnar, sum tó ikki enn eru galdandi, eitt krav um, at feløg, sum luttaka í europeiskum kappingum, skulu hava ein samskipara. Enn hevur NSÍ so ikki tikið lut í slíkum kappingum, men lítið er tó at ivast í, at hetta er eitt av aðalmálunum, tá fótbólturin um góðar tríggjar mánaðir aftur fer á rull.

## Fjølbroyttar royndir

Um Áka Andreasen er annars at siga, at hann hevur nomið sær handilsliga útbúgving við sergrein innan marketing. Eftir hetta hevur hann starvast í bæði Danmark og Noreg, har hann eitt skifti var fyribils stjóri í Elkjøp Stormarked Porsgrunn, umframt at hann her heima hevur starvast á marknaðardeildini hjá Vónini í Fuglafirðir. Eisini hevur hann virkað sum trúboðari fyri Berøa í bæði Danmark og Noreg.



*32 ára gamli Áki Andreasen er nú settur sum samskipari hjá NSÍ*



# Svend Novrup skal venja landsliðið



*Svend Novrup er nú settur sum landsliðsvenjari, og lítið er at ivast í, at hetta er eitt risa stórt framstig fyri bridgelandsliðið*

**Føroyska landsliðið, sum á seinasta altjóða styrkislistanum er nummar 54, hevur nú fingið nýggjan landsliðsvenjara**

BRIDGE

*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*



## Føroyar nr 54 í bridge

Á nýggjasta styrkilistanum hjá WBF, alheims bridgesambandinum, standa Føroyar at vera 54 í heiminum. Hetta kann tykjast heldur løgið, tá hugsað verður um, at vit enn ongantíð hava spælt við í nakrari av teimum stóru kappingunum so sum EM, HM og OL.

Orsøkin til hesa góðu plaseringina finna vit í føroysku luttøkuni í Norðurlandakappingunum (NM). Har hava Føroyar spælt við tey seinastu 20 árini, og hóast vit viðhvørt hava tapt nógv, so viga tey góðu úrslitini, vit hava fingið inn í millum móti hesum sterku mótstøðuliðum, sera tungt. Fýra av Norðurlondunum liggja nevniliga millum 20 tey fremstu í heiminum. Noreg er sum nr 4 tað sterkasta av Norðurlondum.

**Topp 10**

| | |
|---|---|
| 1 | Italia |
| 2 | USA |
| 3 | Poland |
| 4 | Noreg |
| 5 | Indonesia |
| 6 | Niðurlond |
| 7 | Frakland |
| 8 | Russland |
| 9 | Svøríki |
| 10 | Ísrael |

## Landsliðið byrjað at venja

Svend Novrup er settur sum landsliðsvenjari hjá føroyska bridgelandsliðnum, ið skal til EM komandi summar. EM kappingin verður spæld í italska býnum Salsomaggiore í døgunum frá 15. til 30. juni 2002.

Svend Novrup er um tey fimti, dani og býr í Kerteminde á Fjóni. Hann er kendur millum flest øll bridge og talv áhugað í Europa. Umframt at hava drúgvar royndir sum venjari, er hann ein tann mest produktivi rithøvundur innan bridge um okkara leiðir. Hann starvast eisini fyri EuroSport, har hann eitt nú hevur fylgt við Tour de France tey síðstu árini.

Farna vikuskifti var Svend Novrup í Føroyum og hevði tær fyrstu venjingarnar við teimum fimm pørunum, ið kappast um at sleppa at umboða Føroyar við EM. Tey fimm pørini í landsliðshópinum eru hesi:

Bogi Simonsen — Rói á Rógvu Joensen, Jóannes Mouritsen — Heðin Mouritsen, Hans Jacob Petersen — Arnbjørn Sivertsen, Marjun Restorff — Arnleyg Mikkelsen og Árni Dam — Marner Joensen

Venjingin gekk væl, og var Novrup væl nøgdur við tað, sum kom burturúr. Ætlanin er, at Svend skal koma aftur til Føroya nøkur vikuskifti afturat at eygleiða og venja landsliðspørini, men tann stórsti parturin av venjingini fer at vera á internetinum.

Á páskum eru trý føroysk lið boðin til Danmarkar at spæla móti sterkum donskum og møguliga eisini týskum pørum.

Hetta at fara við til EM er eitt stórt stig fyri Føroya Bridgesamband bæði ítróttarliga og fíggjarliga. Talan er ikki um smáar upphæddir, ið skulu til at fíggja eitt slíkt tiltak. Ítróttarliga er avbjóðingin eisini stór. Ein slík kapping setir krøv til leikararnar, tí spælt verður einar seks til átta tímar um dagin í fimtan dagar, og tað er krevjandi fyri bæði likam og sál.

## OL-viðurkenning

At bridge av álvara er vorðin ein altjóða viðurkend ítróttargrein vísa útmeldingarnar hjá tí Olympisku nenvdini heilt greitt. Bridge verður við á komandi vetrar OL í Salt Lake City. Tað at bridge verður ein OL grein merkir m.a. eisini, at bridge kemur undir altjóða doping reglurnar, og hetta hava bridgespælarar kring heimin hesar síðstu 18 mðr. eisini merkt, tá ið teir eru bidnir um at pissa í glas upp á kommando. Tað er mest kaffi, ið teir skulu ansa sær fyri.

Tað kann tykjast løgið, at bridge ikki er viðurkent sum ítróttargrein í Føroyum enn, sjálvt um tað verður gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa Føroyar upp í tí olympisku familjuna. Skal hetta gerast veruleiki, so skal bridge vera viðurkent sum ítróttargrein í Føroyum fyrst. Vónandi ferð tann altjóða viðurkenningin, ið bridge hevur fingið, at skapa eitt ávíst toybil hjá teimum avvarandi myndugleikunum í Føroyum.

## Hvussu melda tit 7 hj?

Her er eitt spæl frá liðkappingini í BK tann 21. november 2001

| | Norður | Suður |
|---|---|---|
| Sp | A | J10965 |
| Hj | J8765 | AKQ9 |
| Rú | KQ1087 | A93 |
| Kl | A7 | 8 |

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| 1hj | pass | 2nt 1) | pass |
| 3kl 2) | pass | 3hj 3) | pass |
| 4nt 4) | pass | 5kl 5) | pass |
| 5ru 6) | pass | 6hj 7) | pass |
| 7hj | pass | pass | pass |

1) Game krav við hjartara
2) Ongan single ella renonce og 15+
3) Single í kleyv
4) RKCB
5) 0 ella 3 ess
6) Spyr eftir trumf frúgv
7) Hevur trumf frúgv, men ongan síðu kong

Soleiðis meldaðu Bogi Simonsen og Rói á Rógvu Joensen hendan stóraslemmin.

Tað er ikki ringt at melda stóraslemm, um tú meldar soleiðis, sum teir gjørdu. Tað, ið lætt kann koma at geva trupulleikar er, um Norðan meldar eftir bókini og vísir sína singleton í spaðara. Nú fær Sunnan tað sera trupult við at síggja nakran stóraslemm, tí hann sær ikki at rútarin er so góður. Lykilin til meldið 7hj liggur hjá Norðan. Hann skal beinanvegin síggja, at tað er hansara hond, sum skal verða tann, ið spyr. Við at melda 3 kl fær hann makkaran at vísa, um hann hevur nakra singleton, og í hesum føri hevur hann single í kleyvara. Nú er einans eftir at kanna tal av essum, trumf frúgv og at telja til 13.

## Jólakapping í Bridgehúsinum

2. jóladag kl 14.00 verður stór jólakapping í Bridgehúsinum. Rói á Rógvu Joensen og Johannes Skaarup skipa fyri. Vinningar verða til tey fremstu pørini.

## Nýggjárskapping

Havnar Bridgefelag byrjar tað nýggja árið við einari opnari parakapping hóskvøldið tann 3. januar kl 19.00. Eisini her verður spælt um ymsar vinningar. Øll eru vælkomin.